## DAGSINS MEINING

# Lagnuløtur – nýval til amerikanska Hægstarætt

Nú doyði so formaðurin fyri amerikanska hægstrarætt, William Rehnquist. Neyvan geva fólk í her um okkara leiðir slíkum tíðindum nakran ans. Vit hava sum so ikki nakað "tilknýti" til Hægstarætt í einum landi sum USA. Kortini, um vit hugsa meira gjølla um hetta, so er greitt, at júst amerikanski hægstirættur hevur ómetaliga stóra ávirkan á framtíðina hjá íbúgvunum í hesum heimsins ríkasta og sterkasta landi - fyri rásarúmið og gerandisdagin hjá komandi ættarliðum. Hægstirættur stendur omanfyri allar politiskar myndugleikar, og avgerðir í hesum dómstólinum kunnu ikki broytast. Hesin rættur er omanfyri alt annað - forsetan, kongressina, senatið og allar aðrar dómstólar í USA.

Tað eru 9 dómarar í Hægstarætti. Teir verða valdir fyri lívstíð. Og tað er tann til eina og hvørja tíð sitandi forsetin, sum velur dómararnar, tá teir fara frá vegna aldur, sjúku ella deyða. Tað er tí tann størsta avgerð ein forseti kann taka, tá hann skal seta nýggjar dómarar til Hægstarætt. Tað eru 11 ár síðani, at nýggjur dómari varð valdur til henda dómstólin seinast. Men nú røkist fyri, at tað skulu veljast tríggir nýggir dómarar til Hægstarætt, og at tað verður George W. Bush, sum skal velja teir allar. Longu fyri tveimum mánaðum síðani valdi Bush tann 50 ára gamla John Roberts til nýggjan hægstarættardómara fyri Sandra O´Connor, sum 1. juli gjørdi av at fara frá. Nú William Rehnquist er deyður skal Bush aftur til at velja ein eftirmann fyri hann. Og líkt er til, at enn ein hægstarættadómari skal veljast, áðrenn seinna skeiðið hjá Bush rennur út.

Hægtirættur kann broyta lógir og avgerðir, sum verða tiknar í allari rættarskipanini ella fyri tað í lóggevandi tingunum. Tað er hann, sum ger av, hvussu amerikanska grundlógin skal tulkast. Og tá henda lóg er meira enn 200 ára gomul og sera stuttorðað, hevur Hægstirættur sera fríar hendur til at avgera, hvussu teir karmar, sum vanligi amerkanarin skal liva undir, skulu síggja út. Hesir 9 dómararnir gera av markið millum religión og stat, millum einstøku statirnar og stjórnina í Washington og millum stjórnina og borgararnar. Tað er Hægstirættur, sum ger av, hvørt samkynd kunnu giftast, og tað var eisini hann, sum gjørdi av sakina Róe versus Wade, sum gav amerikonskum kvinnum rætt til abort. Og sami Hægstirættur kann taka henda rætt frá teimum aftur fær Bush síni fólk vald.

Ultra høgravongurin, sum stuðlar Bush, ger alt fyri at ávirka forsetan at seta konservativ og Bíbliutrúgv fólk í Hægstarætt. Valið av Roberts kann vísa seg at vera í teirra favør. Tí hóast ókendur hevur hann tikið avgerðir, sum hava gagnað Bush og teimum høgravendu, sum eru ímóti aborti og teimum samkyndu. Roberts er katolikkur.

Nú skal so veljast dómari fyri Rehnquist, sum taldist millum teir mest konservativu. M.a. var hann við til at seta í gildi deyðarevsingina aftur. Tað er greitt, at fyri tey mongu, sum ikki dáma politikkin hjá Bush og hansara neokonservativu og eitt nú tí bibilska baklandinum í Suðurstatunum, er talan um lagnuløtur, nú Bush helst sleppur at velja tríggjar nýggjar dómarar. Tað merkir, at hóast Bush fer frá, so kann hansara politikkur og moralur fara at spøkja aftur í Hægstarætti og harvið í øllum tí amerikanska gerandisdegnum langt langt inn í framtíðina. Tað er fyri mong ein ræðumynd. Eisini fyri okkum í sokallaða sivilieraða Vesturheiminum, herí Føroyum íroknað.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Spurningur til Stjórnarskipanarnevndina

### - og Amnesty International, Føroya deild

**Helgi Abrahamsen**



Spurningurin um skrásett parlag hevur enn einaferð verið settur ovast á breddan í føroysku fjølmiðlunum. Eg fari ikki at blanda meg upp í tað kjakið, tí tað vísir seg ikki at vera møguligt at føra eitt sakligt kjak um tann spurningin gjøgnum fjølmiðlarnar.

Men av tí at forkvinnan í Amnesty International, Føroya deild, hevur verið frammi við áheitan á politikararnar um at taka rættindini hjá teimum samkyndu við í komandi stjórnarskipanarlóg, og formaðurin í stjórnarskipanarnevndini hevur sagt, at spurningurin skal takast upp í nevndini, so kundi verið áhugavert at fingið at vita, hvat Amnesty International og stjórnarskipanarnevndin halda um mannarættindi hjá øðrum bólkum í føroyska samfelagnum. Eg hugsi her um rættin til at verða føddur? Um tað er so umráðandi at fáa skrásett parlag við í eina komandi stjórnarskipanarlóg, átti tað so ikki eisini at staði í somu lóg, at frí fosturtøka kann ikki vera loyvd í Føroyum? Ella skal spurningurin um arv, hava størri týdning í føroyska samfelagnum, enn rætturin til at verða føddur?

Hvat heldur Amnesty International, Føroya deild um henda spurningin, og hvat heldur stjórnarskipanarnevndin?

# (ROKNSKAPAR)GRANSKING

**Heri Mohr**



Í einari grein "Fyrst mugu granskararnir granskast", sum Poulsen hevði í bløðunum seinastu viku, lesa vit m.a.: " vit granska, eiga vit at kanna, hvussu nógvir pengar eru brúktir til "gransking" seinastu 25 árini".

Hetta gevur orsøk til at kanna landskassans roknskapir - ikki 25 ár aftur í tíðina - tað kunnu onnur gera - men 5 ár: 2000-2004. Av almennum roknskapum framgongur, at í nevnda tíðarskeiði hevur landskassin samanlagt goldið fylgjandi løgtingsjáttanar:

Biofargransking 6.0 mió.
Granskingarætlanir 7.4 "
Granskingarráð 3.8 "
Økisgransking 8.6 "
Granskingargrunnur 2002-2004 13.9 "

Viðvíkjandi Granskingargrunninum er at siga, at hann varð stovnaður við løgtingslóg nr. 85 frá 15. mai 2001. Í árunum 2002-2004 hevur hann goldið 17.28 mió. til "Tilskot til einstaklingar" og 1.91 mió. til "Lønir v.m.".

Á síðu 293 í landskassans roknskapi 2004 sæst, at Grannskingar- grunnurin tann 31. desember 2004 átti ogn :"Aðrir skuldarar" stívar 6 mió., hevði "Stuttfreistaða skuld" stívar 5.8 mió. og ongan tøkan pening.

Hetta, sum her er skrivað, skal ikki skiljast sum uppílegging í kjakið um gransking, tí orðini hjá Dánjali Nolsøe, sála, í vertskapi í Keypmannahavn eina ferð fyri umleið 58 árum síðani loyvi eg mær (ósmæðið) at gera til míni: "Je kenni mín begrensning".

# Trúð og prógvað

**Christian Fróði Djurhuus**

At prógva seg skriftlærdan og ikki taka til sín einafalda barnatrúgv. At hoyra so nógv um Harran Jesus Kristus og ikki liva sum Hann. Tað kann eitthvørt skrivandi orðabraskmenni menta sálirnar við. Jú vissuliga hava øll hoyrt. Mítt hjarta sum eisini bankar blóðið sum livir í mær. Komin á fundin har afturi. Sum jøkul úr frostbitnum klædningi vellir kreymanin oman eftir ljósum veldugum undrum.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.